## HEILSANIR



**Góða allarbesta Idamostir**
Hjartaliga tillukku á 40 ára degnum.
**Tórður**



**Góði abbon**
Hjartaliga tillukku við 55 ára degnum í dag, og nógv, nógv, góð ár í framtíðini.
**Bestu ynskir Guðrið og Albert**
**PS.** Knappa tíð sum altíð



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum tann 1. mai. Eg gleði meg at síggja tykkum. Heilsa abba.
**Kærar heilsanir frá Karoline**



Hot Dog, Hot Dog, Hot Dog, gev mær Hot Dog, Hot Dog, Hot Dog, Hot Dog.
**Heilsan Ringvegurin**



**Góði Ragnar**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 2. mai.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Vár**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 30. apr. Vit elska teg.
**Mamma, pápi, Fríða, Lív og Bárður**



Hjartaliga tilukku við 17 ára degnum í dag 2. mai. Jesus signi framtíð tína.
**Heilsan vit báðar**



**Góði babba**
Mamma og eg ynskja tær hjartaliga tillukku við 45 ára degnum í dag. Alt tað besta.
**Jákup**



**Hey piparsveinurin**
Hetta er ein farin tíð, nú tú ert farin um tey 30.
**Heilsan Hot Dog**



**Hey Ian**
Skal, skal ikke, skal, skal ikke, SKAL......



**Góða Jónhild**
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum 5. mai. Bestu heilsanir frá okkum
**Svanna Maria**



Stjórin er blivin 30.
**Heilsan arbeiðsfólkið**



Hurlarin blivin 30. Ikki sjólívið tú valdi, men Óluvu tú valdi.
**Heilsan „Vi unge“**



**Góða Anna-Sofia**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Alt tað besta.
**Heilsan vinkonan Svanna Maria**

---

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«

---





*Pætur & Eyðun*

# Nærvarpið leggur hart út!

TÍÐINDASKRIV

Stórt dansitiltak. Stórt dansitiltak verður í Føroyahúsinum í Keypmannahavn leygarkvøldið tann 3.mai frá kl. 22.00-04.00. Portrið letur aftur á midnátt. Nærvarp Okkara, sum skipar fyri, hevur fingið hendur á ikki minni enn tveimum orkestrum, eitt til hvørt gólvið.

Í stovuhæddini verður dansur við Eyðun Nolsøe (sang og auk.guitar), Pætur við Keldu (sang & keyboard), Leivur Thomsen (el. guitar), Agnar Lamhauge (bass) og Petur Dalsgaard (trummur).

Fyri fyrstu ferð í Føroyahúsinum koma diskoljós upp í stovuhæddini.

À 1.hædd verður tequilabarr við frukt og pyntaðum borðum. Tað, sum skal verða yvirraskandi, er, at eitt danskt blues/jazz orkestur (tað kallast: Edis Plesure ), sum kemur at spæla avslappandi chill-out tónleik. Tað eru royndir eldri menn, sum fara at leika New-Orleans-tónleik við sangi, kontrabass, klaver, trækbasun og saxofon.

At hava tvey orkestur í senn er kanska nógv, tá ið Húsið bert rúmar 250 fólk. "Vit tora tó at royna, tí væl gekk í fjør", siga tey í Nærvarpinum, sum eru sera uppsett upp á kvøldið. Nærvarpið vónar, at fólk fara at stuðla tiltakinum, tí tað er so sanniliga gjørt nógv burtur úr fyrireikingini.

Hvør kennir ikki Nærvarp Okkara? Tey, sum hava búð í Keypmannahavn okkurt tíðarskeið, kenna hetta lokalradio, sum danir rópa tað. Nógv eru tey, sum eru komin og farin í Nærvarpinum, og ofta hevur verið skipað fyri góðum tiltøkum sum dansi og fótbólti á stórskýggja í Folkets Hus (nú Lille Vega). Gjøgnum árini hevur hetta verið ein góður mentunarstuðul fyri føroyska útisetan og er tað enn. Vantanti eru millum 1.000 og 5.000 lurtarir, sum ringja inn tá ið sent verður.

Nærvarp Okkara hevur júst skipað nýggja 5 manna nevnd og gjørdar eru ymsar broytingar. T.d. er ein heimasíða komin www.narvarp.dk og so verða sendingarnar sendar av teldu, sum Føroya Sparikassi hevur latið stuðul til. Nevndarformaður og nærvarpsstjóri Edmund S. Jacobsen sigur: "Vit hava fingið tónleika- og samrøðusavn inn á telduna og hava tískil nógv léttari við at senda frá telduni. Á henda hátt verður bíðitíðin hjá lurtarunum og mistøk okkara minimerað. Vit slíta heldur ikki upp á fløgurnar, tó at fyrrverandi sendiútgerð sjálvandi er klár sum eykaútgerð, um teldan skuldi svikið. Ja, vit royna at fylgja við marknaðinum og fara skjótt at vitja aðrar útvarpsstøðir í Kbh., fyri at fáa íblástur. At enda verður sagt at øll, ung sum tilkomin, eru vælkomin at senda nærvarp, sí heimasíðuna.


**VARPIÐ**
**20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna**
**Skráir og ummælir**
**Hvønn fríggjadag**
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2






Hjá Føroya Sparikassa hava allir brikkar týdning. Stórir sum smáir. Nú sóknast vit eftir nýggjum týðandi brikkum soleiðis, at putlispæl okkara skal ganga upp.

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit vænta, at tú ert lívlig/ur og óhátíðarlig/ur. Tú ert ein eldhugaður bólkaspælari og kennir, at sjálvsábyrgd og góð tillagingarevni skapa íblástur.

Vit vilja skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja serstakliga dent á opið og ærligt prát. Tað er við til at menna felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við útbúgving úr Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika til at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú brúkar útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó stremba vit sjálvandi eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Starvsfólkadeildina, tlf. 348510.

Send umsóknina við avriti av próvskjølum til adressuna niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. mai 2003 kl. 18.00.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

www.sparikassin.fo
E-mail: starvsfolkadeildin@sparikasssin.fo

FØROYA SPARIKASSI